## Kursurin hoppaði

Kursurin á partabrævinum hjá Eik Bank hevur verið undikr stórum trýsti í heyst. Fyrr í ár var kursurin heilt uppi á 772, men síðani hevur kurvan at kalla verið einvíst fallandi. Um tað er keypið av Kaupthing ella onnur viðurskifti, sum hava ávirkað, ber bert til at meta um. Men í dag hevur partabrævið flutt seg nakað uppeftir. Soleiðis var kurusurin um døgurðaleitið í dag komin upp á 503.




## Øllum stendur í boði at halda fram

Starvsfólkini, sum fram til nýggjárs eru í starvi hjá Kaupthing, fáa øll møguleikan at halda fram í Eik Bnak. – Vit hava bjóðað teimum, at vit yvirtaka starvssetanina hjá teimum. Hvussu nógv hava tikið av hesum, fái eg einki sagt um. Tí vit tosa við hvørt starvsfólkið sær í løtuni, segði Marner Jacobsen, forstjóri, í viðmerking beint fyri døgurða.

# Bannað eftir nýggjár

**Varð samanleggingin millum Kaupthing og Eik gjørd eftir nýggjár, er væl hugsandi, at nýggja kappingarlógin hevði steðgað hesi**

KAUPTHING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Tann 1. januar kemur nýggj kappingarlóggáva í gildi í Føroyum. Ein av broytingunum í hesari verður, at tað nú skal ansast aftir, at fyritøkur ikki fáa eina ráðandi marknaðarstøðu, ella at ráðandi marknaðarstøður verða styrktar.

Um samanleggingar sigur nýggja lógin at samanleggingar skulu fráboðast Kappingareftirlitinum. Alt eftir, hvat slag av samanlegging talan er um, skulu hesar viðgerast av Kappingareftirlitinum, sum skal viðgera hesar. Hindrar ein samanlegging virknari kaping, við tað at ein ella fleiri fyritøkur skapa ella styrkja eina marknaðarráðandi støðu, kann ráðið ógildi eina slíka samanlegging. Eisini eftir at hon er framd.

Og júst tann parturin av lógartekstinum hevur uttan iva gjørt sítt til, at Eik hevur handlað her og nú, heldur enn at bíða til eftir nýggjárs.

- Tað er sjálvandi trupult hjá mær at tosa um eina samanlegging, sum er framd eftir verandi reglum, og fyrihalda hesari mótvegis reglum, sum koma í gildi 1. januar. Tá verður talan jú ein hypotetiskan spurning, sigur Terji Sigurðsson, stjóri í Kappingarráðnum.

- Men tað er einki at ivast í, at ein slík samanlegging vildi fingið eina viðgerð, um hon varð framd eftir nýggjár. Hon kemur jú undir tey kriterium, sum verða ásett í lógartekstinum. Ein áseting, har tað verður staðfest, at allar samanleggingar, har samlaði umsetningurin hjá feløgunum er omanfyri 75 mió kr., skulu viðgerast.

*Varð samanleggingin av Eik og Kaupthing framd 1. januar ístaðin fyri 31. desember, er væl hugsandi, at hendan vildi verið steðgað av Kappingareftirlitinum*

Men vildu tit – um vit seta hypotetiska spurningin – kolldømt eini slíkari samanlegging?

- Tað dugi eg ikki at svara. Men vit vildu sett upp nøur scenario, har vit høvdu mett um ,hvussu hetta kom at ávirka kappingina. Tekur tú føroyska fíggjarmarknaðin, so er lítil ivi um, at allir aktørar í størri ella minni mun hava eina ráðandi støðu. Og tí er jú heldur ikki víst, at ráðandi støðan verður størri eftir eina samanlegging. Tann spurningurin vil verða ein meting, sum verður gjørd í hvørjum føri sær, sigur Terji Sigurðsson.

Keldur, sum Sosialurin hevur tosað við, meta tó, at ein samanlegging av tí slagnum, sum nú verður framd, vildi verið sera trupul at fingið ígjøgnum, var nýggja kappingarlóggávan galdandi.

# Eik yvirtekur Kaupthing

**Fríggjamorgunin se4ndi Eik Banki út tíðindaskriv. Í hesum varð boðað frá, at bankin frá nýggjárinum at rokna yvirtekur føroyska virksemið hjá Kaupthing Banka**

BANKAVIRKSEMI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í tíðndaskrivinum verður sagt, at avtalan ber i sær, at Kaupthing Bank gevst í Føroyum. Virksemið hjá Kaupthing Bank heldur fram í Eik, og kundaviðskiftini verða flutt til Eik-samtakið.

- Virksemið í Føroyum hevur gingið væl seinnu árini, og eg kenni meg sannførdan um, at henda gongd heldur fram undir nýggju eigarunum. Av tí, at Kaupthing-deildirnar á europeiska meginlandinum gerast støðugt fleiri í tali, hava vit tikið avgerð um at selja okkara virksemi í Føroyum. Eg vil fegin nýta høvið at takka Peter Holm, stjóra, og starvsfólkunum fyri teirra sera góða íkast til Kaupthing og teirra góðu úrslit, sigur Hreidar Már Sigurdsson, forstjóri í Kaupthing.

Virksemið heldur fram í Eik, og kundarnir merkja ikki stórvegis broytingar, tí treytirnar og starvsfólkini verða í høvuðsheitum tey somu sum áður. Tó fáa kundarnir hjá Kaupthing Bank sum kundar í Eik atgongd til fleiri tænastur enn higartil við tað, at Eik hevur eitt breiðari virkisøki enn Kaupthing í Føroyum.

- Vit eru sera fegin um at bjóða kundunum hjá Kaupthing vælkomnum í Eik. Bankavirksemi hevur stórrakstrarfyrimunir við sær, og tí er tað umráðandi at hava eina ávísa stødd. Við hesum keypinum vaksa føroysku útlánini í Eik við uml. 15 prosentum og innlánini við uml. 7 prosentum. Hartil styrkist okkara støða innan virðisbrævaøkið og Investment Banking mundandi, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Eik.

Eik var við til at stovna Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag í 2000.

Virksemið hjá Kaupthing Bank verður formliga yvirtikið mánadagin 31. desember 2007 og fær tí onga ávirkan á ársúrslitið hjá Eik. Hinvegin verða eitt nú inn- og útlán við í javnanum fyri 2007. Javnin hjá Eik var við endan av triðja ársfjórðingi 2007 slakar 20 mia. krónur, og hann økist við umleið 1,2 mia. krónum við yvirtøkuni av virkseminum hjá Kaupthing í Føroyum, verður at enda sagt í tíðindaskrivinum.

## Stjórin var skelkaður

**Talan var eftir øllum at døma um eina bumbu, sum varð slept í hølunum hjá Kaupthing í morgun**

KAUPTHING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Starvsfólkini hjá Kaupthing vistu av ongum, tá tey møttu til arbeiðis í morgun. So seinast sum í gjár hevði bankin lýsing í bløðunum, har sókt varð eftir tveimum nýggjum starvsfólkum, men tá var avgerðin eftir øllum at døma tikin. Gamlaárskvøld verður Kaupthing Bank bert ein partur av føroysku bankasøguni.**

**Umframt tíðindaskrivið, sum varð sent út, fingu starvsfólkini kunning frá íslendsku eigarunum, umframt at Peter S. Holm og Marner Jacobsen eisini høvdu sitt at siga á starsvfólkafundi í morgun. Eftir starvsfólkafundin vórðu starvsfólkini ein og ein innkallað til samrøðu, har nýggju eigararnir komu við tilboði um nýggja starvssetan ella við boðum um uppsøgn.**

**Peter S. Holm, sum hevur stjórnað Kaupthing í Føroyum, síðani Kaupthin Virðisbrævameklarafelag sá dagsins ljós í 2000, var eisini sera fáorðaður, tá vit hittu hann á máli.**

**- Eg haldi fyrst og fremst, at her eru nøkur starvsfólkaviðurskifti, sum skulu greiðast, áðrenn eg úttali meg um málið, sigur hann.**

**Stjórin vil einki siga um, nær hann varð kunnaður um broytingina. Men hann tykist skelkaður av støðuni, ið mest sum frá degi til dags hevur broytt tilveruna hjá bæði sær sjálvum og starvsfólkunum.**

**- Sum sagt, so vil eg ikki siga nakað her og nú. Ikki annað enn tað, at mín framtíð liggur hvørki hjá Eik ella Kaupthing.**